FISKIMÁLARÁÐIÐ

**Innanhýsis**
8. juli 2022
Mál: 22/13268-
(at tilskila í svari)

Viðgjørt: RS

# Upprit

## Broyting í kunngerð um grind og annan smáhval (Grindakunngerðin)

### Orsøk til at málið verður tikið upp

Tað kemur fyri, at nokk av grind er í einum øki í landinum, og at tað tískil ikki er skilagott, at fleiri grindir verða hildnar til í hesum grindaumdøminum. Ynski hevur verið frá sýslumanni um at gera tað smidligari og lættari at lýsa bráðfeingis bann í tílíkum førum.

Eftir springaradrápið í Skálafirði tann 12. september 2021 boðaði løgmaður frá, at landsstýrið fór at eftirmeta springaradráp í Føroyum. Avgerð er tikin um at avmarka springaradráp frameftir.

Sambært altjóða lóg, ásett í Havrættarsáttmála Sameindu Tjóða, kann livandi tilfeingi í havinum verða gagnnýtt á einum burðardyggum grundarlagi. Veiða av springara eins og grindadráp er tí ein rættur, ið vit sambært altjóða lóg hava, og sum er sera týðandi fyri Føroyar.

Havast skal í huga, at veiða av grindahvali og springarum minkar um neyðuga flutningin av matvørum frá útlondum til Føroyar, og tí minkar um okkara útlát av koltvíiltu. Hetta er í tráð við Heimsmálini hjá ST fyri burðardyggari menning, mál nr. 13, umframt at burðardygg gagnnýtsla av øllum sjófeingi er í tráð við heimsmál nr. 14.

### Málslýsing

Uppgávur, sum hava ligið hjá Náttúrugripasavninum, eru nú fluttar til Havstovuna. Tískil verður Náttúrugripasavnið broytt til Havstovan.

Møguleiki verður hjá sýslumonnum at lýsa eitt tíðaravmarkað bráðfeingis bann fyri grindadrápi, um mett verður, at nóg mikið av grind er í grindaumdøminum. Bannið kann fevna um eina ella fleiri hvalvágir. Vísast kann á, at okkurt árið hevur tað verið nokk av grind í Suðuroy. Tá fólk hava nóg mikið av grind, er tað trupult at fáa nokk av fólki at luttaka í grindarakstri, grindadrápi og ikki minst at fáa alt til høldar. Eisini er tað sera

Ministry of Fisheries

Yviri við Strond 15 • P.O. Box 347 • FO-110 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. (+298) 35 30 30 • fisk@fisk.fo • www.fisk.fo

trupult at flyta hval úr Suðuroynni til aðrar oyggjar, tí teinurin er so langur. Við hesi broyting verður tað lættari hjá sýslumonnum at lýsa eitt tíðaravmarkað bann upp til 3 mánaðir í senn.

Uppskotið til kunngerð ásetir eina avmarking í talinum av springarum, sum loyvt verður at drepa.

Havstovan ger vísindaligar kanningar av havsúgdjórum í føroyskum sjógvi, serliga grindahvali og springarum. Harumframt verða hvalateljingar í Norðuratlantshavi fyriskipaðar av NAMMCO uml. 5-7 hvørt ár og fevna um stórhval umframt grind og springarar. Grundað á hesar kanningar verður stovnurin av springara mettur at vera væl fyri.

Roknað verður við, at stovnurin av springarum er upp á uml. 82.600 springarar kring Føroyar. Havstovan metir, at ein burðardygg veiða er 826 skjórutir springarar um árið.

Seinastu fimm árini eru í miðal veiddir 442 springarar um árið. Hagtøl vísa eisini, at seinastu 150 árini eru í miðal 81 springarar hildnir til um árið.

Føroyar hava biðið vísindanevndina hjá NAMMCO um eitt tilmæli um burðardygga veiðu av springara, ið væntandi verður tøkt í 2023 ella 2024. NAMMCO hevur áður staðfest, at stovnurin av grindahvali er væl fyri, og at føroyska veiðan av grindahvali er burðardygg.

Fyri at binda um heilan fingur, verður avmarkingin sett til 500 springarar um árið í 2022 og 2023. Tá endaliga tilmælið fyriliggur, verður avmarkingin endurmett, og veiðan ásett sambært tilmælinum frá NAMMCO um burðardygga veiðu.

Heimild er sett í kunngerðina um møguleika fyri at revsa við sekt, um avmarkingin ikki verður hildin.

**Fíggjarligar og umsitingarligar avleiðingar**

Mett verður ikki, at uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar.

Umsitingarligar avleiðingar eru sera avmarkaðar, men neyðugt verður at fylgja við í, hvussu nógvir skjórutir springarar verða tiknir og veiddir. Í galdandi kunngerð er áseting um, at sýslumaðurin skal senda inn grindaroknskap eftir hvørt grindadráp. Ásetingin er eisini galdandi fyri springarar.